# Stanley er fólkaogn

**Mikukvøldið var konsert við Stanley Samuelsen í Miðlahúsinum. Eini 50 fólk høvdu leita sær oman hagar at hoyra ein inniligan Stanley upptraðka. Og tey sum vóru har, fóru sannførd til hús – sannførd um at Stanley Samuelsen er fólkaogn**

KONSERTUMÆLI
*Rókur Jákupsson Jakobsen*
*rokur@sosialurin.fo*



*Hóast útiseti, so er lítil ivi um, at Stanley Samuelsen er vorðin sonn fólkaogn hjá føroyingum*



*Saman við kúllunum bergtók Stanley fólkið. Løgini fangaðu, tónleikurin fangaði, og einamest fangaði huglagið, sum teir saman megna at geva*

### Fjøldin og maðurin

Mikukvøldið høvdu føroyingar ein sjáldsaman møguleika at hoyra Stanley Samuelsen upptraðka við sínum vakra tónleiki. Stanley hevur fyri stuttum útgivið fløguna “Sól og Regn”, og tað er ein liður í hesari verkætlan, at útisetin var komin hendan vegin at marknaðarføra tónleikin.

Tá ið klokkan nærkaðist 20 sást tað, at Stanley er væl dámdur millum manna. Tá var longu so gott sum fulsett í Miðlahúsinum niðri í Vágbotni, og spenningur var í luftini. Vit sótu og bíðaðu í einar 10 minuttir, áðrenn Stanley og hansara tónleikarar komu oman trappurnar, og lótu seg umsveipa av eini stórari klappsalvu.

Og har setti hesin súmpatiski maðurin seg framman fyri eini fjøld sum veriliga var glað fyri at síggja hann heima á klettunum. Hann tók gittaran í hond, og greiddi okkum frá, at hann enn ikki var komin heilt fyri seg eftir eina nokkso buldrasliga lending. Stanley er ræddur fyri at flúgva, og hann fortaldi at hvørja ferð hann skal á flog, er hann vísur í at flúgvarin fer at detta niður. Lukkutíð er flúgvarin ikki dottin enn. Hetta dámdu áhoyrarinum sera væl. Tað er altíð deiligt at læra persónin betur at kenna áðrenn eina konsert. Og so byrjaði konsertin.

### Klassi, klassi, klaasi

Tað gjørdist skjótt greitt, at Føroyar fylla nógv í gerandisdegnum hjá Stanley. Hann sang okkum nógv løg ið heiðra landið. Stanley legði út við lagnum “Kærleikur til fosturjørð”, sum er eitt væl svingandi kontri lag. Eg havi ongantíð hugsa um Stanley sum nakað annað enn ein frálíkur sangari. Ikki tí at hann meistrar sangteknikkin til fulnar, men heldur tí at hansara sangframførðsla altíð tykist at koma beint úr hjartanum. Men undir konsertini fekk eina heilt aðra fatan av Stanley sum tónleikara. Hann er eitt heilstoypt konsept. Hann skrivar vakran tónleik, hann syngur væl, men tað sum hann ger allarbest er at spæla gittar. Hansara gittarspæl er onki minnið enn fantastiskt. Hann hevði ein bassleikara og ein trummuleikara við sær. Tað, at tónleikurin skuldi verða framførdur av eini trio, plagar at vera ein ábending um, at konsertin verður friðarlig og undirspæld. Men so var ikki! Stanley og hanasra gittari fylti høli sum eitt heilt orkestur, og hetta lyfti konsertina frá at vera góð, til at vera framúr góð. Hann spældi undir, hann spældi soloir og hann lá alla tíð væl. Snøgt sagt, framúr gott gittarspæl.

Sigast skal tó um bassleikaran og trummuleikaran, at teir vístu sanniliga eisini dygdir. Á trummum og slagverki var Gert Smedegaard, og handan bassin sat Knud Henriksen.Teir báðir svingaðu sera væl og spældu eftir tí klóka prinsippinum “Less is More”! Hetta er ein góð læra at hava, men hon er sanniliga ring at meistra. At spæla so lítið sum gjørligt er í verileikanum nógv torførari enn at bara herja á ljóðførini, tí at tá verður hvør einasti tóni sera viðbrekin. Men teir vóru so mikið dugnaligir, at her var ongin slingur í valsinum. Sjálvt tá ið bassleikarin og trummuleikarin fóru heilt upp at svinga, so hildu teir seg allatíð frá at spæla so mikið nógv, at fokus gleið burtur frá røddini og tekstunum hjá Stanley.

### Fangandi løg

Sum áður nevnt, so var konsertin hildin í Miðlahúsinum í Vágsbotni í Havn. Hetta er eitt gott hús til mentanarlig tiltøk. Hølini eru ikki so stór, og sostatt varðveitur tú allatíð ein ávísan intimitet. Hóast hølini ikki er upprunaliga bygd til endamálið, so er eisini ein góður akustikkur inni har. Tey tiltøkið har verða hildin eiga tó ongantíð at gerast ov stór, tí at eg rokni við, at akustikkurin og tann intima kenslan fellur burt um ljóðið er ov hart og fólki stendur sum sild í tunnu.

Eisini stóð the og kaffi á einum borði, og hetta var eisini við til at gera konsertina enn meiri hugnaliga.

Løgini hjá Stanley eru melodiøs og fangandi. Tá ið hann fer í holt við annað niðurlagið í einum sangi, ert tú longu før/ur fyri at nynna við tónleikinum. Hetta ger eisini tónleikin lættan at lurta eftir, tí at tað allatíð kennist sum um tú og Stanley eru á bylgjulongd.

Eitt av hæddarpunktunum á konsertini var, tá ið Stanley spældi fagra lagið “Tað var ein fagran summardag”. Tá fekk hann okkum øll at murra við sær móti endanum, og hetta gav konsertini eina vakra dimensión. (Eg siti faktiskt og murri lagið enn..)

### Postludium

Sjálvandi mátti konsertin enda við nýklasssikarinum “Um eg kundi kvøði”. Nú kókaðu allar kenslur, tí um ein vil tað ella ei, so er hetta eitt tað vakrasta lagið á føroyskum. Fjøldin livdi við lagnum, og tað var ein rørdur Stanley sum var klappaður uppaftur eftir lagið. Allarseinasta lagið sum Stanley-Trio spældi, var “Nowhere man” hjá Liverpool bólkinum mikla.

Tá ið eg trein út aftur í vetrarkuldan, kundi eg ikki lata vera við at sansa landið eitt sindur meiri enn eg plagi. Meðan vøkru løgini hjá Stanley enn rungaðu í høvdinum, fór eg trallandi heimeftir.

## Stanley Samuelsen og “kúllarnir” vóru eminentir í Miðlahúsinum

Fitt av fólkið var komið saman at hoyra Stanley Samuelsen, saman við vinmonnum framføra í miðlahúsinum mikukvøldið. Sjálvur hevði eg eisini leita mær oman fyri at hoyra hendan einastandandi guitarspælari og trobadour framføra, og var vitjanin í Miðlahúsinum tað verd.

Vit sum møttu har fingu eina tónleikarliga uppliving í serklassa.

Hóast “publikummið” var nakað tamt í byrjanini - sum føroyingar vanliga eru - so gekk ikki long tíð, til Stanley og hansara “kúllar” høvdu bergtikið okkum øll.

Tann sera góða songrøddin, góða guitarspæli saman við trummum og góðum bassspælið fylti hvønn krók og okkum við.

Ein merkti og hoyrdi at Stanley livir og brennir fyri tónleikinum, og framførslan var full av følilsum fyri Føroyum, náttúruni, til lívinum.

Sangir sum:
*Sólin ber við fulgasong*
*Kærleikur til móðurjørð,*
*Fyld mine Sejl*
*Morgendagens Lys*
*Horvin Kvøldmynd*

Saman við fleiri av hansara songperlum frá fyrru útgávum hansara, gjørdi framførsluna til ein góða uppliving fyri okkum sum lýddu á.

Tykkum, sum ikki vóru og lýddu á, vil eg mæla til at keypa fløguna Sól og regn, - hon er verd at keypa.

Stanley segði einafer at Beatles er eisini mentan. Eg vil venda hansara egnu orðum til hann sjálvan, - Stanley er mentan tað er vist.

At enda vil eg hervið siga Stanley og “Kúllunum” takk fyri eina góða framførslu og blíður byrður ynskist tykkum.

Heilsan

**Johan Dahl**